Leikrit



# Jól hóast alt

Landsmiðstøðin

# Jól, hóast alt.

**Gamlivættur :**

**Vættralina:**

**Lítlivættur:**

**Vættradidde:**

**Pápin:**

**Mamman:**

**Vár:**

**Símun:**

**Trøllaklávus:**

**Klóka Ugla:**

## 1. partur

(Hagi, grót o.a. við ljósið á. Trøllaklávus kemur inn, møguliga millum áskoðararnar.)

**Trøllaklávus:** (tosar við áskoðararnar)
Oje, her er keðiligt - her hendir einki - einki stuttligt, í hvussu so er! Nógv ímillum tá vættrarnar búðu her úti - tá var lív, tað skal eg siga tykkum. Vit sungu og spældu og gjørdu fortreð........ allar hasu fittu vættrarnar - oh, sum eg sakni tær - hugsi tykkum, at halda jól uttan vættrar, ber tað til ?????
Nei, øll vit trøll vóna, at tær fara at koma fram nú jólini nærkast.

Nei, so er annaleiðis við systkinabarninum, hann býr í býnum. - Hann hevur tað óiva stuttligari.
Hann eitur Trøllapætur. - Kenna tit hann ???????? Tað var stuttligt - tey hava gjørt ein sang um hann kunnu tit hjálpa mær at syngja ???????
(Trøllapætur verður sungin saman við áskoðarunum)

**Trøllaklávus:** (murrar eit sindur víðari)

Nei, nú fari at vitja góðu vinkonu mína, Klóku uglu.

(Klávus á veg út - vættrarnir koma inn í somu løtu)

**Klávus:**
Júmenn, har koma fýra smáar vættrar !!!
(við áskoðararnar)
Hava tit sæð tær???

**Lítlivættur:**
Nú tími eg also ikki at ganga longur. - Vit hava gingið í allan samlan dag og nú er næstan myrkt.

**Vættralina:**
Og eg eri gorhungrað, eg havi einki fingið at eta í fleiri tímar.

**Gamlivættur:**
Ja,ja - vit mugu heldur finna okkum eitt stað at hvíla okkum.

**Klávus:** ( við áskoðararnar)
Skal eg rópa á tey??? ------ Halló, smáu vættrar ! ( vættrarnar gerðast bangnar) Tit skulu ikki verða bangnar fyri mær. Eg eiti Trøllaklávus. Eg búgvi har yviri í hasum heygnum. Koma tit ikki at vitja meg????

**Vættrarnar** : (ísenn)
Jú takk.

(Vættrarnar fara við Klávusi, seta seg niður og mamman setur seg beinanvegin at eta)

**Vættradidde:**
Hví skuldu vit eisini flyta - har var so deiligt í hasum gamla húsinum inni í býnum.

**Gamlivættur:**
Júmen, Didde, tú veitst, at húsini skulu skræðast niður í morgin. Tí vóru bæði vit og okkara menniskju noydd at flyta.

**Didde:**
Hava tit hugsað um, at tað bert eru 2 dagar til jóla??

**Vættralina:**
Rætt er tað - bara vit nú finna onkur fitt fólk innan jólaaftan, annars fáa vit einki at eta, hvørki rísingreyt ella ræst kjøt ella fleskasteik ella...

**Lítlivættur:** (leggur uppí)
Ja, og onkran, sum dugir so væl at baka siroppskøkur sum frú Johannesen....

**Didde:**
Og líka so góðar piparnøtur..

**Vættralina:** (suffar)
Eg fari nú at sakna fleskasteikina mest .......(droymandi) ...... og ta deiligu feitu sósina....

**Gamlivættur:**
Tykkum nýtist ikki at leika so í, tí eg hava hoyrt frá sysktinabarninum Fjallavættri, at úti á bygd, har duga tey at halda jól, so tað forslær.

**Klávus:** (forvitin)
Sig mær, eru veruliga vættrar í býnum enn??? Her úti hava ongar verið í fleiri ár.

**Gamlivættur:**
Jú, nakrar eru eftir. Men sum tey skræða øll hesi gomlu húsini niður eitt fyri og annað eftir, so rýma vættrarnar út á bygd aftur, hagani tær komu fyri fleiri hundrað árum síðani...... Ja, langabbi mín var føddur á einum hoyggjhúsloftið á bygd .....( hugsar og hyggur uttanum seg) .... Eg haldi heilt víst , at tað var um hesar leiðir.

**Klávus:**
Sjálvandi er tað synd í tykkum, at tit soleiðis noyðast at flyta, men eg eri glaður fyri, at vættrar aftur eru her úti.

( meðan teir tosa, hevur Lítlivættur smoygt sær burtur)

**Vættralina:**
Hvar er Lítlivættur?? (Øll leita) Altíð er hann burtur .....hann hevur kiksilvur í endanum.

( Lítlivættur kemur innar við Klóku Uglu, ið ber eina stóra bók undir arminum.)

**Lítlivættur:**
Hey... hygg, hvørjum eg møtti!

**Klávus:**
Júmen, hatta er vinkona mín Klóka Ugla.... Hon er soo klók.....hon kann svara øllum spurningum....
tað er tí at hon hevur hasa stóru bókina.

**Ugla:** (nikkar játtandi og klappar bókini)
Góðan dagin, smáu vinir. .... Sum tað var stuttligt at síggja vættrar aftur her hjá okkum.... men sigi mær, hvat gera tit her úti????

**Didde:**
Vit leita eftir einum staði at búgva. Gamla hús okkara verður niðurrivið. - Tú ert so klók Ugla, kannst tú ikki hjálpa okkum - veitst tú ikki um okkurt gott stað til vættrar ???

**Ugla:**
Jú.... lat meg nú síggja ..... jú .... tá eg spáki um kvøldarnar, plagi eg at koma framvið einum gomlum húsum her í nánd. Hvussu er tað nú tey eita...(blaðar í bókini)
Kristjansstova .... Mikkjalsstova ....Pállstova ..... Sofusarstova ......

Tummasarstova.....TUMMASARSTOVA...har var tað..eg kenni ikki tey,ið búgva har, tey eru tilflytarar... men húsini síggja fittlig út... har eru í hvussu so er nógvar feitar mýs ....hahaha...

**Vættralina:**
Kom, lat okkum fara hagar

Ugla:
Gott hugskot - handan veg!

## 2. partur

Tummasarstova. Keðiligt inni. Vindeyga og møg. 2 hurðar (útgangir), gamlir møblar, borð - 4 stólar -
lítið borð - lenistólur - telefon - skáp á vegginum ( skal kunna latast upp) - pappírskurv - stórur kalendari á vegginum ( vísur 22. des.)

Gamlivættur lúrur innar, ger tekin til hinar vættrarnar, sum so øll koma innar.

**Gamlivættur:** ( hyggur uttanum seg,roynur at ljóða glaður)
Tað sær út til at vera eini fitt gomul hús, vit hava funnið, ha? ....Har var eit gott hoyggjhús ........og stovan her, hon er eisini .... øhh.....bara heilt hugnalig.

**Vættralina:** (hendur í hupp)
So, heldur tú tað??? Tað eru 2 dagar til jóla og ikki so mikið sum eitt einasta jólapynt at síggja.
(slær um seg við ørmunum og fer í skápið eftir eini dós) .. Og í køkudósini eru bert molar.

**Lítlivættur:** (kemur rennandi innar)
Oje, vita tit hvat?? Børnini hava ongan jólakalendara - og eg, sum hevði glett meg at lati allar lúkurnar upp..
(við Didde)..minnist tú, hvussu ill frú Johannesen varð, tá vit opnaðu allan kalendarin tann 1. desember
(Tey flenna)

**Gamli vættur:**
So,so, minnist til, at vit eiga at vera góð hvør við annan.

**Vættralina:**
Her gera tey bestemt ikki rísingreyt og fleskasteik. Her tími eg ikki at vera.
(við áskoðararnar)

Halda tit ikki, at hetta er ov galið???

**Lítlivættur:**
Kom, vit eru farin. bei,bei!!

**Didde:**
Shhh, onkur kemur,vit mugu goyma okkum.

(Tey goyma seg)

Mamma,pápi,Vár og Símun koma innar.Mamman hevur fleiri handilstaskur og setur frá sær á pallinum.

**Mamma:**
Harragud, har vóru nógv fólk í handlinum, har var næstan ikki at koma framat.

**Pápi:**
Og veðrið er eisini ræðuligt. Eg orki ikki fyri øllum hasum kavanum.

**Símun:**
Hví munnu tað vera so nógv fólk allastaðni???

**Vár:** (hyggur at kalendaranum)
Tað er tí, at tað er 22. des - so eru bert 2 dagar til jóla.

**Pápi:**
Puha....longu... folk eru eisini púra svøk við øllum hasum jólaríinum!

**Mamma:**
aððа.....jól meg her og jól meg der....tað er til at spýggja at....gott tað ikki er her hjá okkum.

**Pápi:**
Her í húsinum skulu vit í hvussu so er ikki hava (skapar sær) jólagávur - jólatræ og jólamann
( við áskoðararnar) Tit halda heldur ikki jól heima hjá tykkum, ha????

(Mamma og pápi út)

**Símun:**
Bðææ - jól

**Vár:** (argandi)
Nåååå .... eg sá væl, at tú hugdi eftir jólapynti í handlinum...

**Símun:** (óður)
Tað gjørdi eg ikki, tít bítta beist ( roytur hana)

**Vár:**
Lat vera, tín lort ungi.

**Símun:** (peikar eftir Vár)
Men eg havi sæð eitt jólahjarta í skuffuni hjá tær..eg skal siga tað fyri pápa.

**Vár:**
Tú skalt ikki róta í mínari skuffu,títt frekka beist.

**Mamma:** (kemur innar)
Nú,nú haldið uppat við hasum - farið uttar við jakkunum.

(Tey fara øll uttar.)

(Vættrarnar koma framm - skelkaðar av tí, tær hava sæð)

**Didde:** (grátandi)
Teimum dáma slettis ikki jólini - eg vil ikki vera her...

**Vættralina:** (sær handilstaskurnar)
Man ikki okkurt gott til jóla vera í hasum..(fer yvir - tekur vørurnar fram - eina fyri aðra - og gerst alt meir ovfarin og ræðslusligin) Spaghetti - rugbreyð - skókrem - sápa - livirpostej - w.c pappír - onei, ikki so mikið sum ein vaniljukransur ella marsipan ...... her veri eg ikki verandi !

**Didde:**
Ei heldur eg.

**Lítlivættur:**(við áskoðararnar)
Halda tit her er hugnaligt? ella jólaligt?

Tað haldi eg heldur ikki .... so NÚ eri eg farin ...bei...

(Mammuvættur, Lítlivættur og Didde fara øll til gongu.)

**Gamlivættur:**
Bíði nú eitt sindur. Tað eru bert 2 dagar til jóla, minnist til tað. Vit klára ikki at finna okkum nakað annað stað at vera áðrenn jólaaftan.

(Hini venda illa hýrd við aftur - og í somu løtu síggjast Trøllaklávus og Ugla í vindeyganum)

**Didde;**
Hygg, har eru Trøllaklávus pg Klóka Ugla!

**Klávus:**
Gott kvøld,smáu vættrar. Vit eru úti og spáka - veðrið er so avbera gott -- ordiligt jólaveður.

**Didde:**
Gott kvøld Klávus - gott kvøld Ugla.

**Ugla:**
Gott kvøld, vinir mínir - men hvat er á vási ??? Hví síggja tit so kedd út ???

**Gamlivættur:** (suffar)
Ja,ja, klóka ugla - tað sær tíverri út sum vit eingi jól fáa í ár - fólkini her í húsinum eru stak illa hýrd - og teimum dáma als ikki jólini.

**Vættralina:**
Tað er so syrgiligt,so syrgiligt - tey hava als einki jólahýri.

**Lítlivættur:**
Jólahýri - hvat er tað?? Veitst tú tað Klóka Ugla?

**Ugla:**
Jú, sjálvsagt veit eg tað - eg havi góðu bók mína.(vísur gjøgnum vindeygá á bókina) Í hesari kanst tú
fáa svar á øllum spurningum - - - Bíða mær eitt sindur.

(Ugla og Klávus koma innar.Ugla blaðar í bókini.)

**Ugla:**
Jólaandi - jólabomm - jóladunna - jólaepli - jólafrukt - jólagás - jóla..mmmm.-jóla..mm. jólahýri.. jú.... her er tað jólahýri.
Tað vil siga.: menniskja er so fult av gleði at tað noyðist at gleða onnur eisini ... parentes ..finst serliga í Suðuroy og á smáoyggjunum í desember mánaði.

**Didde:**
Er tað satt, at menniskju uttan jólahýri ikki síggja okkum vættrar - at vit vera líkasum ósjónlig fyri teimum????

**Gamlivættur:**
Jú, tað er rætt Didde - vit eru heilt ósjónlig fyri fólki, sum eru ill og tvør, sum ikki eru góð hvør við annan og sum ikki gleða seg til jóla.

(Gamlivættur fer fram móti áskoðarunum og sigur við BØRNINI)
Síggja tit meg?
Eru tit vís í tí?
So sigi mær,hvat eg eri í á høvdinum?
Ja, ein topphúgva - og hon er grøn,ha?

Ja,ja, tað er heilt rætt - Hon er reyð.
Og hvat er hetta, ja,, vættrabuksur.Vættramamman hevur sjálv seyma tær.
Og- og havi eg nakað uppi á beinunum? Ja, rætt, tuflir....
Og tá tit duga at síggja alt hatta, so er tað, tí at tit eru í jólahýri og gleða tykkum til jóla - meðan
hesi fólkini ( peikarafturefir) bestemt ikki síggja okkum - tey eru slett ikki í jólahýri.
(við hini á pallinum) Eg fái eitt gott hugskot - komið, so skulu tit hoyra -
Eg haldi, at vit fara at vera verandi her í húsinum og so læra vit hasi tvøru fólkini at halda jól.

**Vættralina:**
Ja, eini ordilig jól við fleskasteik og rísingreyti og marsipan og..

**Didde:** (leggur uppí)
.....og jólatræ og jólagávum...

**Lítlivættur:** (dansar og flennur til børnini á áskoðaraplássinum)
Og hasin menniskamaðurin segði, at HER í húsinum skuldi einki vera við vættrum og jólapynti.
(Lítlivættur syngur:)

Ein jólavættur goymdur er og
argar hampafólk
tær síggjast bert av øllum teim,
sum gleða seg til jól'

(øll syngja, vættragenturnar fara fram og dansa)

Vit vættragentur eru fittar
og í góðum lag
vit fáa okkum jólagreyt
og fara so avstað.

(øll syngja, Gamlivættur dansar nøkur fet)

Ein vættur hevur reyða húgvu
hon er sera fró,
hon stórum, smáum hjálpir væl
eins og øll heimsins djór.

(øll syngja 1. ørindi enn einaferð, meðan tey dansa uttar, Lítlivættur seinastur, setur h´vdi fram aftur og sigur: Ojj, sum eg gleði meg.)

## 3. partur

(Inni í stovuni - handilstaskurnar eru burturbeindar)

(Vættrarnar koma innar við pappi og litum.Pappið er í a4 stødd - heimagjørd jólakort)

**Gamlivættur:**
Vit mugu heldur fáa gongd á jólini her í húsinum. Vit kunnu seta okkum her - eingin er uppi enn.

(Vættralina skræðir eitt blað av kalendaranum, so nú vísir hann 23. des.)

(Vættrarnar seta seg við borðið, skriva og flenna.Lítlivættur finnur inniskógvarnar hjá pápanum og koyrir ymist "jólaligt" í teir. Hetta hendir frammi á pallinum, so børnini íá áskoðararplássunum síggja. Hann leggur teimum eina við ikki at siga nakað fyri pápanum.
Tá hinar vættrarnar eru lidnar at "skriva" er eitt jólakort gjørt.)

**Gamlivættur:**
Soleiðis, Didde, nú er jólakortið liðugt. Far tú uttar og legg tað í postkassan.

(Didde vísur børnunum og rennur uttar.Hinar vættrarnar hoyra pápan koma og samlast á einum stað.)

**Vættralina:** (við áskoðararnar)
Minnist nú til, at menniskju ikki síggja okkum, tá tey eru tvør og ill - vit eru heilt ósjónligar.

(Pápin kemur geispandi innar- í pyamas - klórar sær um búkin..Hyggur at kalendaranum og mutlar okkurt týðuliga ónøgdur.Leitat eftir inniskónum,)

**Pápin:**
Maleeena ? hvar eru inniskógvarnir?

**Mamman:** (uttanifrá)
Júman, lítli Mortensen, vóru teir ikki inni í sovikamarinum?

**Pápin:**(ristir við høvdinum og heldur áfram at leita)
Hvar sørin kunnu teir vera? (hann leitar ikki har, teir verunliga eru fyri at fáa ein dialog við børnini á áskoðaraplássinum.Endiliga finnur hann teir og stingur tæmar niðurí - hann gerst ógvuliga skakkur) Hjálp, ein mús er í inniskónum ( ristir alt úr skónum og spyr, hvør hevur gjørt hetta og heldur til seinast at tað óiva er Vár ella Símun.)

(Vár og Símun komma innar.Símun hevur eitt jólakort í hondini)

**Símun:**
Hygg her , pápi, vit hava fingið eitt kort við ...(drálar)...nissum á.

**Pápin**: (gerst kløkkur,heldur tað vera "vemmiligt")
Hatta er óiva tað, tey kalla (skapar sær)...jólakort! (Tekur tað millum tveir fingrar og lesur, meðan tað týðiliga sæst, at hetta dámar honum ikki) Góðu tit fýra! Her er ein lítil heilsa úr Klaksvík. Vit hava tað gott og hava nógv um at vera nú jólini eru í hondum.Vit ynskja tykkum eini góð og vælsignað jól. Kærar heilsur Suffía fastir.

**Vár:**
Pápi, hvør er Suffía fastir?

**Pápin:**
Suffía fastir? - Tað er nokk onkur av hasi undarligi familjuni hjá mammu tykkara.

**Símun:**
Pápi, hvat merkir vælsignað?

**Pápin**( á veg uttar)
Tað veit eg ikki - hatta má vera eitt ev hesum nýmótans orðunum úr sjónvarpinum.(við Vár, árenn hen fer) Skræð hatta korti beinanvegin.

**Vár:** (skræðir kortið og koyrir tað í pappírkurvina og fer uttar.Kemur inn aftur beinanvegin, hyggur uttanum seg, fer yvir og tekur kortið uppaftur, hyggur at myndini) Hetta er í veruleikanum vakurt - eitt pyntað jólatræ og smáir vættrar , sum dansa. Tað hevði kanska ikki verið so galið at hildi jól --- men tað fara mamma og pápi ALDRIN at ganga við til.

**Lítlivættur**: (hevur hugt at Vár alla tíðina. Nú sær hon hann og gerst kløkk)
Ikki vera bangin fyri mær... Eg eri ein vættur...eg eiti Lítlivættur og eri flutt inn í húsini hjá tykkum saman við mammu og pápa mínum og systir míni.

Vár: (bilsin)
Ert tú ein rættur vættur?

Lítlivættur:
Sjálvandi, hevur tú nakrantíð hoyrt um skeivar vættrar?

**Vár:**
Men, hví havi eg so ikki sæð teg fyrr?

**Lítlivættur:**
Tí tú vart illa hýrd og ikki dámdi jólini!
Nú skal tú bara hoyra :
(syngur 1. ørindi av vættrasanginum)

**Vár:**
Jólahýri - tað eri eg í nú !

(Vár og Lítlivættur taka saman og syngja ørindi enn einaferð)

**Vár:**
Eg fari at hanga hetta korti uppá veggin inni í kamarinum hjá mær.(hon fer uttar)

(Telefonin ringir)

(Lítlivættur fer yvir til hinar vættrarnar og pápin kemmur innar og tekur telefonina)

**Pápin:**
Mortensen,Tummasarstova!!

Klóka Ugla: (sæst nú uttanfyri vindeyga við eini stórari telefon, røddin er umgjørd):
Góðan dagin, hetta er frá handilsmanninum. Eg vildi bert siga, at fleskasteikin, tygum hava biði um er komin úr Havn.

**Pápin:** (bilsin)
Fleska.... hvat????

**Ugla:**
Fleskasteikin...tygum vita.... til jólaaftan!!

**Pápin:**(illur)
Bíða mær eitt sindur .... (rópar uttar til mammuna) Maaleenaa?????

**Mamman:** (kemur innar saman við Símuni)
Ja, hvat er áfatt,lítli Mortensen??

**Pápin:**
Hetta er úr handlinum,tey siga vit hava bílagt eina fleskasteik til ...(skapar sær)
...jólaaftan! Veitst tú nakað um tað???

**Mamman:**
Fleskasteik....eg havi ikki biðið um nakra fleskasteik....sið við hann, at vit hava ikki brúk fyri jólamati.

**Pápin:**
Tygum kunnu eta tygara steikiflesk ...øøhhh.....fleskasteik sjálvur (klamsar hornið á)

**Ugla:** (við vættrarnar)
Ja,ja... hatta gekk so ikki...tað var harmiligt...

**Vættralina:**
Bíða nú.. vit hava til alla lukku okkara sproytu við vaniljukransalugti..... hana hava vit arva frá
oldurabba Gamlavættri.

**Didde:**
Nú skal eg fara eftir henni.

**Vættralina**:(við børnini)
Minnist nú til...tey síggja okkum ikki.

(Didde kemur aftur við einari stórari sproytu og vættrarnar fara fram á pallin)

**Gamli vættur**:
Lat meg royna, um hon riggar enn.(sproytar undir næsarnar á mammuni og Didde, sum sveima burtur)

**Vættralina**:
Ohhh....sum hetta var gott..... oh,denn deiligi luktur av vaniljukransum....oohhhh.... eg eri vís í, at hetta fer at rigga.

**Lítlivættur**:(tekur sproytuna)
Lova mær eisini at royna!!!(Hann sproytar undir næsarnar á Mortensen familjuni)

**Símun**:
Her bleiv ein løgin luktur??

**Mamman**: (luktar)
Ja,fý for sørin,hvaðani mann hann koma???

**Pápin**:
Ja,puh-ha...er tað tú, sum hevur prumpa, Símun???

**Didde**:
Lat meg royna (hon sproytar á tey trý enn einaferð)

**Pápin**: (hostar opg harkar)
Lat meg sleppa út í fríska luft.

**Símun**:
Meg við (heldur fyri nøsina)

(Teir renna uttar:)

**Mamman**:(luktar enn einaferð- andar djúpt inn)
Bíða mær eitt sindur...(luktar aftur) Hetta minnir meg um nakað...(Didde sproytar aftur).....Nakað deiligt.....(luktar aftur)... Nú veit eg...vaniljukransarnir hjá ommu...tað er tað, tað luktar av....
(fer heilt fram á pallin) Eg fái hug at fara at baka nakrar - kann tað gera nakað???....Bara eg nú hevði minnst til hvussu...tí ..tað hevði nú.....verið ...hugnaligt..at hildi jól aftur. (tosar fyri seg sjálvan)
Hvussu var tað nú uppskriftir var???? (kemur við øllum møguligun og ómøguligum uppskotum t.d.
2 kg av eggum ... ketchup..... 1 teskeið av mjølið .... rabardusúltutoy osv. Dialogur við børnini. Vættrarnar mima evt við) Nei,nei, eg noyðist onkursvegna at fáa fatur á røttu uppskriftini.

**Gamlivættur:**
Kanska Klóka Ugla kann vera til hjálpar!
(rópar) Klóka Ugla hvar ert tú???

**Klóka Ugla:** (kemur til sjóndar í vindeyganum)
Hvat vilja tit mær???

**Didde:**
Eigur tú eina uppskrift til vaniljukransar?

**Ugla:**
Sjálvandi eigi eg tað .... bíða mær eitt sindur...
(uglan og trøllið koma innar á pallin, uglan hyggur í bókina og tosar alla tíðina)
siropskøkur... sólberjasúltutoy....toskarhøvd....upsaflak....vaflur....
VANILJUKRANSAR
(skræðir síðuna úr) ger so væl.

(Didde tekur uppskriftina og letur hana detta niður í fangi á mammuni, sum verður bilsin og glað)

**Mamman:**
Júmann, her er hon...uppskriftin (lesur) ...Ná,ja,...soleiðis ger mann ( hyggur upp og fær eyga á Didde) Men... hvør ert tú???

**Didde:**
Eg eiti Didde og eg eri ein vættur.

**Mamman:** (bilsin)
Ein vættur ?????... Her í okkara húsum????

**Didde:**
Ja,og tað eri ikki bara eg...(hinar vættrarnar nærkast) ..hatta er Gamlivættur...og Vættramamma ... og Lítlivættur...(tey heilsa)

**Mamman:**
Men hví havi eg ikki borið eyga við tykkum fyrr?????

**Didde:**
Tað skal eg so væl siga tær. Lurta nú ....(syngur)

(Vár er komin innar, meðan sangurin er - mamman,Vár og Didde taka saman og syngja enn einaferð, Uglan og trøllið syngja við)

**Mamman:**
Og sum tað er deiligt at vera í jólahýri aftur. Kom, Vár, nú fara vit at baka vaniljukransar.

**Vár:**
Juh - huh--

## 4. partur

(Tá ljós kemur á pallin, sita vættrarnar frammi á pallinum.)

**Vættralina:**
Oh, sum hasir vaniljukransarnir vóru góðir - tær duga bara væl at baka - Vár og mamman, ha? gott, at uglan hevði eina uppskrift.

**Lítlivættur:** (heldur um búkin)
Hasar køkurnar vóru næstan ov góðar.

**Vættradidde:**
Oje, eg gleði meg til jólaaftan (fer yvir at skræða eitt blað av kalendaranum) Júmenhygg har - tað er longu í kvøld - har stendur 24. desember, og Símun og pápi hansara halda enn einki um jólini - hvussu skulu vit klára tað????

**Lítlivættur:** (grátandi)
Hvat???? Verða so eingi jól????

**Vættralina:**(grætur eisini)
Og eg, sum hevði glett meg so nógv!!

**Vættradidde:** (lippar)
Hvat skulu vit gera?

**Gamlivættur:**(ótolin)
So,so - halt uppat við hasum grátinum og turka eyguni. - Vit skulu nokk finna uppá okkurt - (hugsar seg væl um, meðan hini turka eyguni) Men - vit noyðast allarhelst at biða vinir okkara hjálpa okkum.

**Lítlivættur:**
Nú skal eg fara at rópa eftir teimum (rópar) Trøllaklávus----Klóka Ugla ---(teir koma ikki og hann biðir børnini á áskoðaraplássinum hjálpa sær. Tá koma vivinir til sjóndar í vindeyganum)

**Trøllaklávus:**
Her eru vit----tað var gott, at tit róptu so hart - vit vóru langt úti í haganum.

**Klóka Ugla:**
Er nakað, vit kunnu hjálpa tykkum við?

**Gamlivættur:**
Jú, tað kannst tú ætlað, jólaaftan er í kvøld og vit hava ikki fingið Símun og pápa hansara í jólahýri.Hygg í hasa stóru bókina hjá tær, um ikki okkurt er, sum hjálpir???

**Ugla:**
Bíða mær eitt sindur (kemur inn á pallin,klórar sær í høvdinum) uuhhh - hatta er ein torfør uppgáva---men lat meg nú síggja!! (blaðar í bókini) Jólabomm---jóladunna----jólamatur---- jólatræ ----mmmmmm-----
her er okkurt---jólastuttleiki (lesur innantanna og flennir) ......hoyr --komi her øll somul.

(øll savnast uttanum ugluna - tey tosa,mutla og flenna)

(Nú hoyrast pápin og Símun uttanfyri)

**Vættralina:**
Shyss - still---nú koma teir (við uglu og Trøllaklávur) goymi tykkum (teir fara út) (við vættrarnar) Á plássini-- nú verður leikur!!!

(vættrarnar seta seg aftanfyri útvarpstólið)

(Símun og pápin koma innar)

**Símun:**
Hevur tú sæð kalendarin, pápi --- tað er 24. des. í dag.

**Pápin:**
Guð´ske lov, so eru hesi jólini skótt at enda komin (fer eftir einum blað og setur seg at lesa)
(Símun tekur eisini eitt blað, blaðar eitt sindur í tí, fer so yvir og tendrar útvarpið)

(Útvarpið - Vættrarnar, sum gera rødd sína annaleiðis)

**1.rødd:**
---og komandi hálva tíman fara vit at bera góð ráð til teirra, sum kring Føroyaland gera seg klár til at halda jólaaftan.

**2.rødd:**
---men lat okkum byrja við eitt sindur av tónleiki----(vættrarnar syngja ein jólasang - føroyskan)

**Pápin:**
Sløkk hatta útvarpið ---- hatta er ikki til at halda út at lurta eftir-----

**Símun:**
Kann eg ikki sleppa at royna at finna onkra aðra útvarpsstøð ?

(pápin mutlar okkurt)

(Símun fæst við útvarpstólið - vættrar gera "ljóð" til. Við eitt verður aftur jólasangur (t.d. norskur ella enskur. Símun fer nú at lurta og tað so við og við út, sum honum dámar tað)

**Pápin**: (illsliga)
Sløkk so hasa umhvørvisdálkingina, drongur!!!!

**Símun**:
Ohh,pápi, bara einaferð avtrat:

(Símun fer aftur at fáast við útvarpið- aftur gera vættrarnar "ljóð", og so byrja tær at syngja
Lítla,fitta nissa mín)

**Pápin**: (nú tættiliga illur)
Kann man nú ikki sleppa frá hasum jólatvætlinum í sínum egna heimi???? (langar avísina niður á borðið og fer uttar)

(Símun hyggur aftaná honum,sløkkir eitt sindur syrgin útvarpið - melur á gólvinum og roynur at murra Lítla, fitta...)

**Símun**:
Hasin var góður ---- hvussu var tað nú, hann var ??

**Vættrarnar**: (leypa framm )
Halló, Símun!!

**Vættralina**:
Skullu vit hjálpa tær?

**Símun**: (kløkkur)
Hvørji eru tit??

**Lítlivættur**:
Sært tú ikki tað?? (peikar á húgvuna)

**Vættradidde**:
Vit eru jú vættrar !!

**Símun**:
Hvaðani koma tit??

**Vættralina**:
Vit hava verið her leingi - tú hevur bara ikki sætt okkum - tí at tú vart so tvørur og ikki dámdi jólini !!

**Vættradidde**:
Vilt tú sleppa at læra handan sangin?

**Símun:**
Ja, tað vil eg ógvuliga fegin!

**Vættradidde:** (biður børnini á áskoðaraplássinum hjálpa við at syngja "Lítla, fitta nissa ...." so Símun kann læra sangin. Meðan sungið verður, koma mamman og Vásr innar. Mamman við eini dós av vaniljukransum, og Vár við einum stórum flættaðum hjarta)

(Meðan tað seinast av sanginum verður sungið, fara vættrarnar framvið mammuni og fáa eina smákøku.
Nú enda vættrarnir aftast á pallinum, meðan mamman og børnini eru fremst)

**Símun og Vár:**
Og, sum tað er stuttligt at vera í jólahýri.

**Mamman:**
Tað haldi eg eisini ---- men nú mugu vit øll royna eisini at fáa pápa í jólahýri, so vit kunnu halda jólaaftan.

**Vættrarnar:**
Nú kemur hann.

(Pápin innar)

**Pápin:** (sær køkurnar)
HVAT síggi eg ----- JÓLASMÁKØKUR ---- í MÍNUM húsi --- hvaðani koma hasar????

**Mamman:** (eitt sindur bangin)
Eg havi --øøhh ----bakað tær---øøhh---eg--fekk sovorðnan hug til ---øøhh---at halda ---øøhh jól aftur . --Vilt tú ikki hava eina??
(gevur pápanum eina køku)

**Pápin** : (bítur í, men spýtur út aftur)
Fý for sørin --- hatta smakkar av jólum --- aðððа ! - og so er hol í eisini...

**Vár:**
Hygg her,pápi -- eitt jólahjarta - er tað ikki vakurt??

**Pápin:**
Vakurt??? -- hatta er ræðuliga ræðuligt ---(gálvar) Hvar HEVUR tú fingið hatta??

**Vár:** (eitt sindur "fornermað")
Vættrarnar hava hjálpt mær at gera tað!

**Pápin:** (rættiliga skelkaður)
VÆTTRARNAR?????

**Vár:**
Ja,vættrarnar!!!

**Pápin:** (gongur aftur og fram á pallinum - vættralina beint í hølunum á honum)
Vættrar---her í okkara húsið----nei,nei,tað ber ikki til ----vættrar---her inni...nei, tað er ógjørligt..

**Mamman:**
Jú.rætt er tað - men tú sært tær ikki.. ha? lítli Morternsen??

**Pápin:** (gongur enn við Vættralinu í hølunum)
Fjas og tvass ---sjálvandi hevði eg sæð tær -- um tær vóru til ... sovorðið tvætl og fjas ... (við áskoðararnar) Síggja tit kanska nakrar vættrar her ????? (tá børnini hava svarað endar hann aftur við at siga : Sovorðið tvætl og fjas)

**Vættralina:** (við áskoðararnar)
Kom, lat okkum syngja lítla,fitta....

(Øll syngja)

**Pápin:** (heldur um høvdið)
Haldið uppat....steðgið... eru øll blivin púra ør ??? ÚT__ÚT::: ølll út higani......ÚÚÚT.....

(Øll ríma út - pápin dettur stunandi niður í lenistólin,sovnar og snorkar hart.Mamman kemur innar og ballar eitt teppi um hann.Mamman,Vár og Símun koma innar við jólapynti at hanga upp, eini jólastjørni at seta á borðið og einum "sprellimanni".Pápin etur í avøvni smákøkur úr dósini, sum mamman lat standa eftir. Meðan pápin svevur, arga vættrarnar við lora okkurt jólapynt undan loftinum niður í høvdið á honum, so hann í svøvni roynir at skumpa hetta burtur.Tað kann endurtakast nakrar ferðir, meðan hini pynta)

**Mamman:**
Sum her verður hugnaligt.

(Trøllaklávus og Ugla koma innar við einum jólatræ, vættrarnar hjálpa at bera - tær koma inn millum áskoðararnar, syngjandi )
Sangur:

**Ugla:** (meðan teir seta træið frá sær á pallin)
Tað var gott, Klávus, at tú visti hvar, vit kundu skaffa okkum eitt træ í kvøld.

**Trøllaklávus:**
Eg sá, at handilsmaðurin hevði trø eftir at selja, tá eg var heimi í bygdini í dag. (fer niður í lumman) og hygg, hvat eg eisini havi funnið!! (tekur ljósketu e.a. fram)

(tey pynta og murra onkran jólasang)

**Mamman**:(hart, so pápin vaknar)
Nei, sum tað er vakurt!!

(Pápin sær træið- gerst skakkur og hálar teppi upp um høvdið.Letur tað eina stutta løtu seinri glíða niður um eyguni - hyggur uppá træið og hálar teppi upp aftur. Hyggur aftur eina løtu seinri, reisist spakuliga,gníggjar eyguni,fer runt í stovuni- luktar jólastjørnuna - hyggur at teim ymsu jólatingunum - roynir sprellimannin - flennur - men skundar sær at vera álvarsamur aftur - endar yviri við træið - gongur spakuliga rundan um tað - gerst spakuliga meir og meir í jólahýri - meðan hetta fer fram standa hini í útjaðaranum á pallinum og eygleiða hann spent.- Pápin roynir at syngja onkran jólasang, meðan hann gongur runt - ogvulia falskt - tá rópa øll hini : Gleðilig jól.)

**Pápin**: (sum nú sær vættrarnar)
So eru vættrar her í Tummasarstovu.

**Vættrarnar**:
Ja!

**Mamman**: (mussar hann á kjálkan)
Gleðilig jól, lítli Mortensen.

**Pápin**: (heilsar uppá allar vættrarnar - sigur "góðan dag pippa" við Uglu - gerst kløkkur av Klávusi osv.)
Hjartaliga vælkomin í Tummasarstovu - nú kunnu vit halda ein rættiligan jólaaftan.

**Vættralina**:
Við nógvum góðum mati...

**Vættradidde**:
Og góðgæti .....

**Lítlivættur**:
Og jólagávum....

**Vár og Símun**:
Juhuu...

(meðan seinastu replikkirnar verða sagdar, savnast leikararnir aftanfyri jólatræið og syngja 1. ørindi av vættravísuni einar tvær ferð øll á pallinum klappa til.)

ENDI.


F
En nis- se kan man ik- ke se, han
C7
er en dril- le- pind. Han ek- si- ste- rer
Bb C7 F
kun for men'- sker, der har ju- le- sind.